Jólakalendarin 2006

Trøllapætur og omman halda jól

Í dag orkaði sólin ikki at kaga uppum Hvítaskarð. Í morgun kavaði eina løtu og nú ýldu vindarnir aftur. Tað var trøllsligt og hugnaligt í lítlu smáttuni omanfyri Garð. Trøllapætur hevði borið ríkiligt av brennið inn og legði fríska við í eldin. Omman sang og murraði, meðan hon elti tveir nevar av gandadeiggi, sum hon tveitti á glóðheitu pannuna.

Trøllapætur hugdi inn í eldin og hugsaði um árligu trøllaveitsluna, sum fór at verða í kvøld. Ja, tað var gleimur og gangur, tá ið trøllini á stytsta degi spældu myrkaspæl og hildu jól saman.

Tey gomlu trøllini ræddust ljós, og fyrr í tíðini var ikki vanligt at síggja trøll á alljósum degi. Men við tíðini broytist so mangt. Nú halda trøllini sær at gaman á myrkastu nátt og tá verður etið, sungið, dansað og beistast allan sólarringin, ja og onkuntíð longri.

– Omma, ert tú spent til trøllaveitsluna.

Trøllapætur visti svarið, men kortini kundi hann ikki lata vera við at spyrja.

– Ja, nú byrja okkara jól. Tá omma er liðug at baka, so fara vit at gera okkum klár til stóra trøllaballið. Og tað verður nakað stuttligt, tí at øll trøllini á Stórafjalli verða ivaleyst har.

– Eisini Trøllabilla og tey? Trøllapætur vildi vita.

– Ja, góði. Har verða nógvir trøllaungar, trøllagentir og trølladreingir, trøllagubbar og trøllagummar, trøllamammur og trøllapápar og trøllaabbar og trøllaommur. Og oldurtrøll, tipptrøll og hippitipptrøll. Og tað verður við buldur og brak trøllini seta stevnu. Fyri ikki so nógvum árum síðani trúðu fólk, at toran var trølladansur og snarljósið árliga trøllakyndlagongan. Í dag eru trøll og børn ikki so bangin fyri hvørjum øðrum. Ja, mangt er broytt í ommusa tíð.

– Trøllapætur var bæði spentur og glaður, tá ið hann hugsaði um alt tað góða, sum nú fór at henda. Hann stóð í brúna vetrarkotinum og í nýggju gummiskómum og hevði fjallstavin í høgru hond og pakkan til Billu í hinari. Hann gleddi seg til trøllaveitsluna og at skula verða saman við øllum trøllabørnunum til klokkurnar kimaðu jólaaftan. Og tá kundi hann gleða seg til góðan jólamat, jólapakkar, jólatræ, jólasang og at síggja jólamannin. Oy oy oy, sum tað var gott at vera trøll.

Trøllaomman hevði slókt eldin og var farin í ommustásið.

– Men omma, skulu vit ikki lata jólakalendaran upp, áðrenn vit fara í trøllaveitslu?

– Píkarill! Jú, sjálvandi. Tað er onki at bíða við, fitta trøllið mítt.

Trøllpætur hevði funnið lúku 22 á jólakalendaranum. Varisliga prikaði hann fremstafingur inn undir pappið og hugdi fegin uppá Trøllaommuna.

– Hygg, ein mynd av jólaskipinum!

Á, góðasti Trøllapætur. Tað hevði verið stuttligt um vit sóu jólaskipið á ferð uppum fjallið. Ja, hvør veit? Jólamennirnir og allar gávurnar koma nú til landið. So tað verður stuttligt hjá tær og mær, tá ið vit koma aftur av trøllaveitslu jólaaftan.

Trøllapætur smílist og var í góðum hýri. Ja, tað er gott at vera trøll í Føroyum. Serliga á jólum.

Vit ynskja tær eini góð og hugnalig jól

Tel 345600, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

- so ert tú tryggari